## Dagur 2

# Margretha slapp til Mykinesar

**VITJAN** Túrurin hjá Margrethu drotning til Mykinesar var leingi eitt ivamál vegna mjørka. Men tá alt sá svartast út, lætti tokan, og tyrlan kundi lenda í sólskini í Mykinesi.



*Drotningarhjúnini júst lend í Mykinesi. Oskar Joensen greiðir frá um bygdina.*



*Glað drotningarhjún í Mykinesi.*

Inna Tørnroos

Margretha var í beige littari drakt og Heindrikkur í knæbuksum og reyðum jaktsokkum.

Danski journalisturin undir liðuni á mær spurdi, um tað vóru føroysk klæði, hann var í ...

Eitt av mongu blómutyssunum varð handað drotningini. Í Mykinesi var tað Ronja í Eyðanstovu, ið var blómugenta.

Varaborgarstjórin í Sørvágs kommunu, Jóhan á Ørg, bjóðaði drotningini og Heindrikki prinsi vælkomnum, og fylgið fór síðani niðan í flaggskrýddu bygdina.

Oskar Joensen greiddi frá um søguna og tey ymisku húsini. Eisini varð vitjað í Kristianshúsi, har málningar av Sámal Joensen-Mykines vórðu vístir fram.

Síðani fekk drotningin og fylgi hennara ein betri bita í bygdarhúsinum, áðrenn leiðin gekk til Miðvágs og Vestmanna.

### Nógv á skránni

Í Miðvági vitjaðu drotningin og prinsurin á Krígssavninum. Vágakórið sang, og borgarstjórin, Albert Ellefsen, flutti fram røðu.

Í Vestmanna var nógv á skránni. Byrjað varð á Fiskivinnuskúlanum, har Jákup Mørkøre undirvísti hjúnunum í lívfrøði. Síðani fór Heindrikkur prinsur niðan á SEV og síðani til ungdómshølið »Staðið«, meðan drotningin helt seg til søgu og kirkjulív og vitjaði Søgusavnið og Vestmanna kirkju.

*inna@sosialurin.fo*

*Sandavágsbørn vóru eisini úti og veittraðu til drotningina.*





*Á SEV fekk Heindrikkur prinsur undirvísing í, hvussu vatn verður gjørt um til orku.*



*Tyrluflogskipararnir, ið flúgva fínu gestirnar.*



*Drotningin vitjar Krígssavnið í Miðvági. Karl Jóhan Nielsen greiðir frá.*



*Nógv folk tóku ímóti drotningini í Vestmanna.*